# Dátuverndarkunning
## Barnaverndartænastan í Vágum

### Soleiðis viðgera vit tínar persónsupplýsingar

Barnaverndartænastan í Vágum, hereftir nevnd Barnaverndartænastan, er ein almennur myndugleiki, ið viðger mál um børn. Okkara fremsta uppgáva er at tryggja, at børn, sum liva undir viðurskiftum, ið kunnu skaða teirra heilsu og menning, fáa neyðuga hjálp og umsorgan í rættari tíð, og at hjálpa teimum við at fáa ein tryggan uppvøkstur. Sum liður í hesum arbeiði viðgera vit persónsupplýsingar, sum eru neyðugar fyri at kunna røkja tær uppgávur, ið vit hava ábyrgd av. Tað er okkara ábyrgd at tryggja, at tú trygt kann lata barnaverndartænastuni tínar persónsupplýsingar.

Í hesi dátuverndarkunning kanst tú lesa nærri um hvussu Barnaverndartænastan viðger persónsupplýsingar í okkara arbeiði og um tíni rættindi í hesum sambandi.
Í dátuverndarkunningini koma vit nærri inn á:

- Dátuábyrgd og dátuverndarfólk
- Endamálið við okkara viðgerð
- Bólkar av persónsupplýsingum
- Hvaðani upplýsingarnar koma
- Heimildargrundarlagið fyri viðgerðini
- Hvørjum barnaverndartænastan letur persónsupplýsingar til
- Varðveitslu av persónsupplýsingum
- Tíni rættindi

### Barnaverndartænastan í Vágum er dátuábyrgdari
Barnaverndartænastan í Vágum er dátuábyrgdari. Allir spurningar og viðurskifti viðvíkjandi persónsupplýsingum og dátutrygd ella møguligum trygdarbrotum skulu stílast til Barnaverndatænastuna.

Barnaverndartænastan í Vágum
Hammershaimbsvegur, 360 Sandavágur
Tlf. 344430
Teldupostur: bvt@vaga.fo

Um tú sendir Barnaverndatænastuni teldupost, eigur telduposturin ikki at innihalda trúnaðar- ella viðkvæmar upplýsingar, uttan so at telduposturin er bronglaður.

### Hvørjum lógum og reglum er Barnaverndartænastan í Vágum fevnd av?
**Barnaverndartænastan viðger persónsupplýsingar sambært ásetingunum í eitt nú**
- **Løgtingslóg um vernd av persónsupplýsingum (Dátuverndarlógin)**
- **Løgtingslóg um barnavernd**

**Samband við okkara dátuverndarfólk (DPO)**
Barnaverndartænastan hevur valt at seta eitt uttanhýsis dátuverndarfólk.

Dátuverndarfólkið veitir okkum hjálp við at tryggja dátuverndina í Barnaverndartænastuni. Um tú hevur spurningar viðvíkjandi tínum rættindum í sambandi við okkara viðgerð av tínum persónsupplýsingum, kanst tú seta teg í samband við dátuverndarfólkið:

> **Dátuverndarfólk Jónas Tór Næs, adv.**
> Faroe Law
> Magnus Heinasonar gøta 10
> 100 Tórshavn
> Tlf. +298 22 28 38
> Teldupost: jtn@faroelaw.fo

Um tú sendir dátuverndarfólkinum teldupost, eigur telduposturin ikki at innihalda trúnaðar- ella viðkvæmar upplýsingar, uttan so at telduposturin er bronglaður.

## Endamálið við viðgerð av persónsupplýsingum

Barnaverndartænastan hevur eina røð av uppgávum, sum innibera viðgerð av persónsupplýsingum, m.a. at viðgera fráboðanir. Fyri at loysa uppgávurnar er neyðugt hjá barnaverndartænastuni at viðgera persónsupplýsingar.

*Hvørjum persónsupplýsingum hava vit tørv á?*

Barnaverndartænastan viðger einans tær upplýsingar vit hava tørv á fyri at røkja uppgávuna sum barnaverndarænasta. Vit savna einans upplýsingar, sum eru neyðugar fyri at vit fáa útint okkara uppgávur sum myndugleiki. Hetta kunnu vera vanligar persónsupplýsingar og viðkvæmar persónsupplýsingar, alt eftir, hvat okkum tørvar fyri at røkja okkara uppgávur, herundir upplýsingar um heilsuviðurskifti sosial viðurskifti, trivnaðin og uppalingina hjá børnum umframt upplýsingar um familjuviðurskifti og møguligar konfliktir og avbjóðingar. Barnaverndartænastan hevur í ávísum førum eisini upplýsingar um revsiverd viðurskifti.

Í flestu førum hava vit eisini tørv á p-talinum til eintýðuga eyðmerking.

Barnaverndartænastan hevur tørv á upplýsingum um bæði børn, familjuna hjá børnum og/ella tann, ið hevur foreldramyndugleikan og aðrar viðkomandi persónar fyri at tryggja at málið verður upplýst so væl sum gjørligt, soleiðis at uppgávan kann loysast.

Tú hevur altíð rætt til at fáa at vita, hvørjar upplýsingar vit viðgera um teg. Tó er týdningarmikið at hava í huga, at ein umbøn um innlit eftir dátuverndarlógini, er ikki tað sama sum ein umbøn um innlit eftir fyrisitingarlógini og innlitslógini.

*Hvaðani stava upplýsingarnar?*
Vit savna upplýsingar á ymiskan hátt.

Vit kunnu fáa upplýsingar frá eitt nú

- skrásetta sjálvum og familju
- myndugleikum og stovnum,
- skúlum og dagstovnum,
- sálarfrøðingum, heilsufrøðingum o.l.
- læknum og tannlæknum
- skráum, eitt nú hjá TAKS ella Fólkayvirlitinum og
- øðrum borgarum

Tú hevur rætt til at verða kunnað/ur um hvørjar upplýsingar vit skráseta um teg.

## Heimild

Hvør okkara viðgerðarheimild er, veldst um hvørjar upplýsingar vit viðgera og hvat endamálið við viðgerðini er. Vit kunnu einans viðgera upplýsingar, sum eru neyðugar til endamálið við viðgerðini.

Okkara viðgerðarheimild eftir dátuverndarlógini ("DVL") er í høvuðsheitum:

- DVL § 8, stk. 1, nr. 2, 3 og 5 (vanligar persónsupplýsingar)
- DVL § 12, stk. 1, nr. 2, 3, 6, 7 (viðkvæmar persónsupplýsingar)
- DVL § 16 (p-talið)

Umframt ásetingunum í DVL eru serligar reglur galdandi fyri viðgerð av persónsupplýsingum á einstøkum lógarøkjum. Tá ið slíkar serreglur eru galdandi, fylgja vit sjálvsagt eisini hesum reglum.

## Hvussu verjir Barnaverndartænastan í Vágum persónsupplýsingar?

Starvsfólk á Barnaverndartænastuni hava undir ábyrgd í borgarligari revsilóg tagnarskyldu um viðurskifti um einstaklingar, feløg, fyritøkur og stovnar, sum tey í starvi sínum fáa kunnleika um, bæði meðan tey arbeiða fyri Barnaverndartænastuna og eftir, at tey eru farin úr starvi. Sama er galdandi fyri hjálparfólk, stuðlar og onnur, sum starvast fyri Barnaverndartænastuna.

Vit gera alt fyri at tryggja, at persónsupplýsingarnar verða nøktandi vardar, soleiðis at óviðkomandi ikki fáa atgongd til upplýsingarnar.

## Hvørjum letur Barnaverndartænastan í Vágum persónsupplýsingar?

Barnaverndartænastan letur upplýsingar víðari til aðrar almennar myndugleikar sum liður í okkara myndugleikaútinnan, oftast við samtykki frá avvarðandi foreldramyndugleikanum og/ella barnið, ið er 15 ár ella eldri.

Í ávísum førum kunnu veitarar av skipanum og tøkniligum loysnum hava atgongd til upplýsingar, t.d. í samband við support, dagføringar ella hýsing. Hesi verða øll áløgd somu strongu tagnarskyldu sum starvsfólkini á Barnaverndartænastuni og í teimum ávísu førum at veitarar eru at meta sum «dátuviðgerar», verður serstøk viðgerðaravtala gjørd, ið inniheldur somu ásetingar um tagnarskyldu.

*Varðveitsla og striking*

Barnaverndartænastan hevur sambært fyrisitingarrætti, skjalasavnslóggávu o.ø. skyldu til at verðveita upplýsingar í málum fyri at skjalfesta málsviðgerðina. Tá ið Barnaverndartænastan ikki longur hevur tørv á persónsupplýsingunum, verða upplýsingarnar avhendaðar til Tjóðskjalasavnið, sbrt. løgtingslóg um skjalasøvn.

Á summum økjum kann styttri ella longri strikingarfreist vera ásett í lóg.

## Tíni rættindi

Tú hevur sambært DVL eina røð av rættindum í mun til okkara viðgerð av tínum persónsupplýsingum og viðgerðina av persónsupplýsingum hjá barnið tínum. Um tú ynskir at útinna hesi rættindi, skalt tú seta teg í samband við barnaverndartænastuna.

*Rætturin til innlit*

Tú hevur rætt til at fáa at vita, hvørjar persónsupplýsingar barnaverndartænastan hevur um teg og barn títt.

*Rætturin til at taka samtykki aftur*

Um okkara viðgerð av tínum persónsupplýsingum ella persónsupplýsingum hjá barnið tínum er grundað á samtykki frá tær, hevur tú altíð rætt til at taka samtykkið aftur. Tá ið tú tekur samtykkið aftur, steðga vit viðgerðini av teimum persónsupplýsingum, sum var grundað á samtykkið, um ikki vit hava annað heimildargrundarlag at viðgera persónsupplýsingarnar.

Gev gætur, at um tú tekur aftur eitt samtykki, eru vit møguliga ikki før fyri at veita tær eina ávísa tænastu.

*Rætturin til rætting*

Tú hevur rætt til at biðja um at fáa rættað persónsupplýsingar, sum eru rangar ella villleiðandi, soleiðis at vit ikki viðgera upplýsingar um teg ella barn títt, sum eru skeivar ella ófullfíggjaðar.

*Rætturin til striking*

Í serligum føri hevur tú rætt til at biðja um at fáa strikað persónsupplýsingar, sum vit hava um teg og barn títt. Rætturin er ikki treytaleysur, tá ávísir upplýsingar ikki mugu strikast grundað á aðra lóggávu, ella um avtala og ávíst endamál gevur Barnaverndartænastuni rætt til at varðveita og viðgera persónsupplýsingarnar.

*Rætturin til mótmæli*

Tú kanst átala, at persónsupplýsingar um teg og barn títt verða viðgjørdar. Um átalan má metast heimilað, skulu persónsupplýsingarnar um teg ikki viðgerast. Tó kunnu upplýsingarnar møguliga framvegis nýtast til at viðgera onnur lóglig endamál.

*Rætturin til viðgerðaravmarking*

Í serligum føri hevur tú rætt til at biðja um at fáa viðgerðina av tínum persónsupplýsingum avmarkaða. Um treytirnar til viðgerðaravmarking eru loknar kunnu vit einans viðgera tínar persónsupplýsingar í serligum førum.

*Rætturin til at klaga*
Tú hevur altíð møguleika at klaga til Dátueftirlitið, um tú ert ónøgd/-ur við okkara viðgerð av tínum persónsupplýsingum.

Samskiftisupplýsingar hjá Dátueftirlitinum eru at finna á www.dat.fo.

**Útgáva - september 2023**